


*Eitt av børnunum hjá Borghild gongur í skúlanum í Oyndarfirði. Spurningurin er, hvussu leingi hesin skúlin verður opin aftrat, um ein skal fylgja politiskum ynskjum. - Um skúlin letur aftur, so fer tað at ávirka hugin hjá barnafamiljum at búseta seg her. Tí vóni eg ikki, at tað hendir. Okkara børn tey trívast í øllum førum í skúlanum*



## 62 km til høvuðs-staðin

Skalt tú til Oyndarfjarðar, so mást tú veruliga vilja at fara higar. Hetta er ikki ein bygd, sum tú bara soleiðis koyrir framvið.

Vegurin millum Fjarða bindur aðrar bygdir saman, men ætlar tú tær til Oyndarfjarðar er neyðugt at velja tað: Ein má av høvuðsvegnum inn á Oyndarfjarðarvegin.

Tá fólk koma á vitjan hjá Borghild og Martin, so hendir tað ofta at tey ringja fyrst og spyrja, um tey eru inni. So sleppa tey undan at koyra tann laaanga vegin til húsini í Billustovu, uttarlaga í bygdini.

- Fyrimunurin við tí er, at tá fólk koma higar á gátt, so njóta tey friðin og steðga tí leingi. Tað er líkasum at dagurin fer bara, tá ein fyrst er komin higar til Oyndarfjarðar, vísir Borghild á.

# Pluss og minuss

Ein fyrimunur við at búgva í Oyndarfirði er, at bygdin hevur handil, sum verður umrøddur aðrastaðni í blaðnum.

– Ja, tað er deiligt at bygdin hevur ein handil. Vit keypa tað vit kunnu her, fyri at stuðla handlinum, men sjálvandi tey stóru innkeypini gera vit aðrastaðni, á veg til hús eftir loknan arbeiðsdag.

– Men tað er eisini deiligt við einum handli, um ein knappliga stendur og manglar okkurt. Ella um børnini hava hug at keypa sær okkurt, so er stuttur vegur niðan til Eivind, vísir Borghild á.

– Fyri nøkrum árum síðani keyptu vit okkum eitt gamalt 4-mannafar sum Niklas í Koltri hevur bygt, og um summarið rógva vit ella sigla vit við segli út á okkurt gott mið, sum er okkum fortalt, at fiska eitt kók. Og tað er fantastiskt at kunna fiska stóran og góðan tosk, nærmast beint uttanfyri køksvindeygað.

Hóast tað eru nógvir fyrimunir við at búgva í Oyndarfirði, so er Borghild eisini fult greið yvir vansarnar.

– Ein av hesum er vandin fyri at missa eitt sindur av tí dagliga samskiftinum við vinfólkini. Eg meini, her er jú einki SMS, har ein kann renna seg inn í tey soleiðis mestsum av óvart.

– Men eg veit ikki. Eg hoyri eisini frá fólki í Havn, at man sæst ov lítið kortini. Tað er næstan so, at man hevur nokk í tí sum man sjálvur ger, vísir Borghild á.

Tá tey eru í Havn royna tey at vitja so nógv av familjuni og vinfólkunum sum til ber, ella tey bjóða teimum norður at vitja.

– Men tú kanst sjálvandi skjótt rokna út, at tað er ógjørligt at vitja øll hvørja ferð, tá vit bæði hava okkara familjur og vinfólk í Havn.